

# Eingi kolvetni í boring hjá Faroe Petroleum

Deil:

**Jan Müller**

07.07.2014 - 11:09

Oljan.fo

Faroe Petroleum boðar frá, at nú er liðugt at bora Butch South West leitibrunnin, sum er ein upp-fylgingarbrunnur til Butch East brunnin og Butch Main fundið, sum Faroe eigur 15% av.

Byrjað varð at bora Butch South West leitibrunnin tíðliga í juni mánaða 2014, og borað varð niður á 1.945 metrar. Komið varð fram á eina 55 metra djúpa jarðargoymslu, men eingi kolvetni vórðu funnin

Centrica (40%) var fyristøðufelag og brúkti Maersk Giant boripallin til boringina. Hini feløgini, sum luttóku í boringini vóru Suncor Norge (30%) og Tullow Oil Norge (15%). Brunnurin verður nú typtur og fráfarin.

Fyristøðufelagið arbeiðir við eini útbyggingarætlan fyri tað týðandi Butch Main fundið, sum væntandi verður klár í 2015.

Graham Stewart, forstjóri sigur í viðmerking, at tað er skuffandi at bæði eystara og útsynnings síðurnar av Butch strukturinum ikki øktu um nøgdirnar av kolvetni á Butch økinum, men nú verður arbeitt við at gera Butch Main oljukeldina klára til framleiðslu.

Eftir eitt tíðarskeið við nógvum virksemi verður skjótt boða frá úrslitinum av Bue síðusporsbrunninum í Norra.